FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

25. januar 2024
Mál: 24/00987-2

Tygara skriv: 52-070/2023

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-070/2023 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um Bygdaleiðir og Eysturoyartunnilin**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er arbeiðið at skipa fleiri túrar hjá Bygdaleiðum úr Klaksvík og gjøgnum Eysturoyartunnilin byrjað?
2. Nær kann væntast, at nýggj ferðaætlan er tøk?
3. Hvussu nógv ferðandi vóru við Bygdaleiðum í 2023 sammett við 2022?

**Svar til spurning 1**
Strandferðslan arbeiðir miðvíst við at gera tillagingar á millum annað farleiðini millum Norðurøkið og Tórshavn. Strandferðslan er tó í tí støðu, at sáttmálabundnar útreiðslur við bussveitarar gera, at um fleiri túrar verða koyrdir gjøgnum Eysturoyartunnilin, er neyðugt við hægri játtan, um ikki tænastan, á eitt nú leið 400 millum Norðurøkið og Tórshavn umvegis Sundalagið, skal skerjast munandi.

Í dag eru 16 ymiskar Bygdaleiðir bundnar saman við koyringini á leið 400. Skal Strandferðslan skerja koyringina á hesari leið, fyri at økja um koyringina millum Klaksvík og Tórshavn umvegis Eysturoyartunnilin, fer hetta at gera tænastuna verri á flestu av hesum leiðum.

Tað er sjálvandi ein munandi betri tænasta og umhvørvisvinarligari at stytta koyritíðina millum Klaksvík og Tórshavn. Strandferðslan vísir tó á, at leið 400 er mest nýtta leið av teimum 24 Bygdaleiðunum, og at ein stórur partur av ferðafólkunum á hesari leið skulu til ella frá bygdum ávegis millum Klaksvík og Tórshavn.

Í dag ber eisini til at skifta millum leiðir og at nýta leið 450 millum Eysturøkið og Tórshavn, fyri at koma aftur og fram millum Klaksvík og Tórshavn. Strandferðslan

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

ásannar, at tænastan millum Norðurøkið og Tórshavn kann betrast, og at arbeitt verður við tí.

At Strandferðslan skal rinda fult gjald fyri hvønn buss, sum skal gjøgnum undirsjóvartunlarnar avmarkar fíggjarliga rásarúmið fyri at hækka tænastustøðið, t.d. at í størri mun koyra gjøgnum Eysturoyartunnilin, fyri at betra um tænastuna og koyritíðina millum samanbundnu økini.

**Svar til spurning 2**
Strandferðslan fyrireikar seg í løtuni til summarferðaætlanina. Ein partur av hesum er at fáa fleiri túrar á leið 401 millum Klaksvík og Tórshavn. Treytað av fígging og kapasiteti hjá bussveitarum verður miðað eftir at gera fleiri tillagingar á Bygdaleiðum innan 1. mai 2024, harundir á leið 401.

**Svar til spurning 3**
Samlaða ferðafólkatalið fyri 2023 var 521.125. Hetta er ein øking upp á 8% samanborið við 2022. Sí talvu niðanfyri.

Síðani 2020 eru áleið 200 túsund ferðafólk løgd afturat, og tí er ferðafólkatalið í 2023 nú tað hægsta síðani 2014. Meðan okkara grannalond hava havt stórar avbjóðingar við at fáa ferðafólkatalið í felagsferðsluni aftur á sama støði sum undan koronutíðini, so hevur gongdin hjá Bygdaleiðum í hesum sambandi verið betri. Tað fegnast vit sjálvandi um, og Strandferðslan fer at leggja nógv fyri, at góða gongdin skal halda fram komandi árini.

| Ár | Í alt | Broyting | Broyting % | Index 2023 |
|---|---|---|---|---|
| 2013 | 523.955 | | 0 | 100,00 |
| 2014 | 520.126 | -3.829 | -1% | 99,27 |
| 2015 | 502.888 | -17.238 | -3% | 95,98 |
| 2016 | 516.716 | 13.828 | 3% | 98,62 |
| 2017 | 500.308 | -16.408 | -3% | 95,49 |
| 2018 | 506.977 | 6.669 | 1% | 96,76 |
| 2019 | 494.585 | -12.392 | -2% | 94,39 |
| 2020 | 319.822 | -174.763 | -35% | 61,04 |
| 2021 | 405.310 | 85.488 | 27% | 77,36 |
| 2022 | 480.901 | 75.591 | 19% | 91,78 |
| 2023 | **521.125** | 40.224 | 8% | 99,46 |

**Dennis Holm**
*landsstýrismaður*